## Russi keypir bløð

Russiski ríkmaðurin Alexander Lebedev er í ferð við at keypa meirilutan av partabrøvunum í enska blaðnum The Independent. Tað skrivar russiska tíðindastovan ITAR-Tass. Sambært tíðindastovuni fær hann meirilutan fyri eitt sterlingpund, men afturfyri skal hann binda seg til at seta fleiri milliónir pund í blaðið, sum er í stórum fíggjarligum trupulleikum. Tann 50 ára gamli Lebedev eigur frammanundan enska blaðið The Evening Standard, sum hann eisini keypti fyri eitt sterlingpund. Áðrenn hann fór at gera íløgur, var Alexander Lebedev oberstur í loyniligu russisku løgregluni KGB.



## Illir fiskimenn

Nú um dagarnar gingu fiskimenn úr øllum USA mótmælisgongu uttan fyri tinghúsið Capitol í Washington, har teir kravdu, at politikararnir skulu broyta fiskiveiðireglurnar. Síðani 2007 hava myndugleikarnir ásett reglur, sum skulu verja fiskastovnarnar og byggja teir upp, og tað hevur skert møguleikarnar hjá nógvum fiskimonnum. Fiskimenninir halda ikki, at tann vísindaliga rilráðingin, sum myndugleikarnir lurta eftir, er bein. Politikararnir siga harafturímóti, at tað tekur tíð at byggja stovnarnar uppaftur, men at tað fer at gagna vinnuni og samfelagnum í seinna enda.

# Fakligi førleikin hjá Havstovuni størri enn áður

**Nýggi stjórin á Havstovuni er doktari í havlívfrøði og hevur starvast á Havstovuni síðan 1987. - Eg fari at leggja stóran dent á at hava eitt tætt samband við tey fólk í samfelagnum, ið hava brúk fyri teirri vitan, sum Havstovan fær til vega. Eg fari at kunna um okkara arbeiði og úrslit, lurta og kjakast, sigur Eilif Gaard**



*- Havstovan hevur eitt nógv betri grundarlag at byggja sínar metingar á, enn hon nakrantíð áður hevur hav frameftir eisini, sigur Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni*

STJÓRASKIFTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá móttøka var á Havstovuni seinasta fríggjadag, hevði Sosialurin stutt prát við nýggja stjóran, Eilif Gaard og við fráfarandi stjóran, Hjalta í Jákupsstovu, sum vit fara at venda aftur til í hesi grein.

### Samstarv úteftir

Eilif Gaard er doktari í havlívfrøði og hevur starvast á Havstovuni síðan 1987.

- Eg fari at leggja stóran dent á at hava eitt tætt samband út til tey fólk í samfelagnum, ið hava brúk fyri teirri vitan, sum Havstovan fær til vega. Eg fari at hava eitt tætt samband við vinnuna og samfelagið annars. Eg fari at kunna um okkara úrslit, lurta og kjakast.

Hvørjar vónir hevur tú um, at politiska skipanin í størri mun enn í dag fer at fylgja fiskifrøðiligari ráðgeving, so vit kunnu sleppa undan boykottum í Bretlandi?

- Eg havi vónirnar um, at vit fara at koma okkum burturúr hesum trupulleika. Tað má og skal eg hava. Vit gera tað vit kunnu fyri at gera eitt gott og haldbart fakligt arbeiði og upplýsa so væl, sum vit kunnu. Eg havi vónir um, at tað verður betri á hasi síðuni, sigur Eilif Gaard.

Væntar tú so, at samstarvið millum ráðgeving og politiskar myndugleikar við tær sum stjóra verður so mikið gott, at vit sleppa undan boykottum?

- Ja, sum eg segði, havi eg vónir um tað, leggur hann aftrat.

Eilif Gaard vísir á, at tað er "trendurin" allastaðni uttanum okkum, at brúkarar seta krav til, at burðardygg troyting fer fram av tilfeinginum.

- Hetta síggja vit allastaðni, og tað síggja vit eisini í Føroyum. Hetta má til, og eg havi virkuliga vónir um, at vit fara at kunna loysa hesi viðurskifti nógv betri frameftir, sigur nýggi stjórin.



*- Eg eri púrasta avkláraður, nú fari úr stjórastarvinum, og eg ivist onga løtu í, at Eilif Gaard verður ein góður stjóri, sum ikki nýtist ráð frá mær til hesa uppgávu, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Styrkt grundarlag

Eilif Gaard verður annars róptur faðirin at gróðurkanningunum, sum hava eini 20 ár á baki.

Vit spurdu tí, um Havstovan við hesum kanningum aftrat øðrum regluligum kanningum hevur eitt enn betri grundarlag at byggja sínar metingarnar um fiskastovnarnar á?

- Jú, Havstovan hevur eitt nógv betri grundarlag at byggja sínar metingar á, enn hon nakrantíð áður hevur havt. Fakligi førleikin er størri, enn hann hevur verið nakrantíð frammanundan. Gróðurkanningarnar eru eitt av reiðskapunum, sum vit brúka og fara at brúka meiri aktivt frameftir eisini, sigur nýggi stjórin.

### Batar á veg

Hvussu metir Eilif Gaard, at støðan er við toska-og hýsustovninum, nú hann tekur við stjórastarvinum?

- Toska-og hýsustovnarnir eru rættiliga lágir í løtuni. Her hevur verið vánalig tilgongd fleiri ár á rað. Men seinastu tvey árini hava verið væl betri enn miðal. Vit høvdu tí væntað, at toska-og hýsustovnurin fóru at mennast, og øll tekin eru nú um, at so verður. Tað sær soleiðis út, at nakrir góðir árgangir eru á veg innan hesi fiskasløg, sigur Eil-